# Listin kann drukna í stórfundum

**Nordisk Kulturforum hevur sínar styrkir, men vit mugu ansa eftir, at sjálv listin ikki druknar á slíkum stórfunum, har luttakarnir hava so ymisk áhugamál, halda føroysk mentafólk, sum luttóku á Norðurlendska Mentanarfundinum í Havn herfyri**

## Mentan



**Anna V. Ellingsgaard**
blaðkvinna
anna@sosialurin.fo

70 luttakarar úr átta ymsum londum heilt frá ovasta ráðharra til einstaka listafólkið vóru savnað á mentanarligu ráðstevnuni Nordisk Kulturforum í síðstu viku. Enn einaferð vóru mentafólk úr Norðurlondum kallað saman at endurskoða og koma við broytingaruppskotum til norðurlendska mentanarsamstarvið, sum tað skal skipast frá 2010 til 2012.

Fleiri líknandi fundir hava longu verið, tí tað hevur víst seg, at stóru broytingarnar sum vóru gjørdar í mentanarliga samstarvinum í 2007 ikki eru nøktandi.

Fundurin hesuferð var í stóran mun skipaður sum smærri arbeiðsseminar, har luttakaranir í bólkum arbeiddu við ymsum evnum. Niðurstøðurnar hjá arbeiðsbólkunum vóru síðani sendar Norðurlandaráðnum, sum tekur støðu til, hvussu uppskotini skulu raðfestast í einum nýggjum mentanaráliti.



70 fólk úr átta ymsum londum og enn fleiri listarligum fakøkjum royndu at finna felags stev á Nordisk Kulturforum í Havn herfyri

### Finna sama mál

Longu í byrjanini á ráðstevnuni kom fram, at ein tann største avbjóðingin á slíkum stórfundum er, at ymsu luttakararnir ikki tosa sama mál soleiðis at skilja, at teir ikki leggja sama týdning í gjøgnumgangandi hugtøk.

Sum dømi nevnir Jenny Petersen, stjóri á Tjóðpallinum, hugtakið "Kreativur ídnaður" sum var eitt av høvuðsevnunum á fundinum. Hetta var eisini evnið, sum hennara bólkur arbeiddi við, og eftir hennara tykki fór óneyðuga nógv tíð til at semjast um, hvat orðið merkir.

- Embætisfólkini høvdu eftir øllum at døma ongar trupulleikar við orðinum, meðan listafólkini beinavegin vóru á varðhaldi, tí tey sóu okkurt slag av samlibandslist fyri sær. Tí skutu vit eisini upp at brúka hugtakið "Kreativ næring" í staðin fyri, greiðir Jenny Petersen frá.



*- Slíkir fundir eru fínir til eftirmeting, men stóra forummið darvar ofta neyva samskiftinum um ávís mentanarhugtøk, sigur Jenny C. Petersen, stjóri á Tjóðpallinum*



*Vit mugu ansa eftir, at listarliga dagsskráin verður sett úr erva á slíkum stórfundum, heldur Oddfríður M. Rasmussen, luttakari og formaður í LISA*

Hóast hetta kann ljóða sum orðkloyvari, hevur tað alstóran týdning, at slík hugtøk koma uppá pláss, tí tað kann verða avgerandi fyri, hvussu peningaligi stuðulin verður latin, minnir Jenny Petersen á, og heldur fram.

- Tá tú til dømis kjakast um, hvat sambandið er millum list, mentan og kreativan ídna, er tað heilt avgerandi, at tú veist, hvør ger hvat. Eftir okkara tykki er tað innan list og mentan, at hugskotini og granskingin fer fram, og tað skal sjálvandi stuðlast peningaliga. Kreativan ídna fata vit hinvegin sum ein sølulið, sum má væntast at geva yvirskot, men sum also livir av hugskotunum frá listini í eini áhaldandi ringrás, greiðir hon frá.

Jenny Petersen ásannar, at tvørrandi samskifti kring slík týðandi hugtøk ofta darvar arbeiðinum á stórfundum sum Nordisk Kulturforum, har listafólkini ofta óttast, at sjálv listin druknar. Tí eftirlýsir hon eisini fleiri smærri faklig forum, har til ber at savna seg um einstaku listagreinina.

### Tryggja armslongdina

Hesum er Oddfríður M. Rasmussen, formaður í LISA samdur í. Sum dømi um eitt sera væleydnað fakligt minni forum av hesum slag, nevnir hann norðurlendska Bókmentaforummið í Oslo fyri fimm árum síðani. Fundururin kom í lag, tí bókafólk høvdu varnast, at týðarastuðilin brádliga var horvin í nøkrum broytingum, sum júst vóru gjørdar í mentanarliga samstarvinum.

- Tað var sjálvandi ein vanlukka fyri bæði rithøvundar og týðarar, og ikki minst fyri møguleikan hjá ymsu tjóðunum at marknaðarføra sínar bókmentir. Úrsliti av fundinum var, at týðarastuðulin fekk eina pulju fyri seg, og tískil ikki longur er bundin av trý-ára programminum hjá Nordisk Kulturforum, sigur Oddfríður M. Rasmussen.

Hann er sannførdur um, at tað var sakkunleikin í einum lítlum forum, sum hesuferð tryggjaði góða úrslitið. Tí er eisini hann á varðhaldi, tá dagsskráin í mentanarsamstarvinum verður sett úr erva á einum stórfundi við ov lítlum atliti til einstøku listagreinarnar.

- Ein tann største vandin á slíkum stórfundum er eisini, at øll ikki hava somu fatan av armslongdarprinsippinum. Tí er tað eftir mínum tykki framvegis best, um spurningar viðvíkjandi einstøku listagreinunum verða viðgjørdir av sakkønum fólki í smærri bólkum fyrst, sigur Oddfríður M. Rasmussen.

Nordisk Kulturforum hóskar hinvegin fínt, tá løtan er komin at taka samanum og eftirmeta, heldur hann.